# nmarkar



ini tamarhald á støðuni. Men tá børnini verða eldri, verða trupulleikarnir eisini størri, og børnini og foreldur teirra hava tørv á størri hjálp, sigur Evy.

Evy hevur søkt um umlætting eitt vikuskifti um mánaðan, so at hon kann hava eitt sindur meira tíð til hinar døturnar, men hetta hevur enn ikki eydnast.

- Eg eri ótrúliga glað fyri, at tað nú gongur tann rættan vegin. Men vit stríðast framvegis, og Jónhild fyllir ótrúliga nógv heima hjá okkum. Í dag dugi eg at síggja, at vit sum familja mugu fáa hjálp, so at eg eisini kann vera mamma hjá hinum døtrunum.

Vónin hjá Evy er, at føroysku politikararnir síggja álvaran í hesum málið og broyta umstøðurnar so børn, sum ikki megna vanliga fólkaskúlan, kortini kunnu trívast og mennast í Føroyum.

- Eg ynski so inniliga, at vit sleppa undan at senda børn okkara av landinum, sigur hon at enda.

*- Eg haldi, tað er deiligt, at foreldur finna skúlar í Danmark til børnini, tá ið tey onga hjálp fáa her. Men sjálv ynski eg at sleppa undan at enda í tí støðu. Eg vil so gjarna, at dóttir mín skal vaksa upp í Føroyum, sigur Evy, mamma at 12 ára gamlari gentu við ADHD*

# Ein vavstur av ymsum lógum og ráðum

**Skúlastjórin á Miðvágs-Sandavágs Skúla, Hans Jørgensen hevur skotið upp eina nýggja samskipaða lóg fyri alt barnaøkið, har vit skipa umsiting og ábyrgd í eina og somu ráðharrastovu**

BØRN OG UNG
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Ússalig er tjóð okkara, um vit ikki eisini geva pláss fyri teimum, sum ikki teljast millum teirra, ið uttan trupulleika megna at taka ímóti vanligari umsorgan og undirvísing í siðbundna fólkaskúlanum, staðfestir skúlastjórin í Sandavágs-Miðvágs skúla, Hans Jørgensen*

Undir yvirskriftini »Tíðarandin spælt fallitt«, skrivar Hans Jørgensen grein í Skúlablaðnum, um skerdu møguleikarnar hjá einstøku skúlunum at hjálpa børnum við serligum tørvi. Hann staðfestir, at hugskotið við at flyta ábyrgd og myndugleika út í sokallaða nærumhvørvið langt síðan er farið á heysin.

- Vavstur av ymsum lógum og sundurbýti av fleiri skerja virkismøguleikarnar í samfelag okkara. Hetta merkja vit ikki minst í skúlaverkinum. Skúlalógin, kommunulógin, almannalógin og viðhvørt eisini fyrisitingarlógin eru mangan so samantvinnaðar, torskildar og mótsigandi, at uppløgd mál gerast trupul og ofta ómøgulig at loysa, sigur Hans Jørgensen og heldur fram:

- Persónliga gleddist eg, tá ið teir báðir, okkara frægastu landsstýrismenn Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni, longu í byrjanini av landsstýrisskeiðinum boðaðu frá, at teir fóru at tosa saman regluliga til tess at gera tað lættari at greiða málini hjá teimum nógvu, sum detta niðurímillum, tí skúlalóg og almannalóg ikki samvirka.

- Bara í okkara skúla uppliva vit ferð eftir ferð, ja, á hvørjum ári, at næmingar og foreldur koma í svára neyð, tí myndugleikarnir eru ikki førir fyri at hjálpa teimum. Skúlaleiðslur, Sernámsdepilin og Almannastovan royna at finna loysnir, men illa gongst at náa úrslit og forstáilsi, tí lógargrundarlag og játtan samsvara ikki við tørvin.

### Ótolandi og óvirðiligt

Hans Jørgensen sigur, at hóast stig eru tikin positiva vegin, so eru kortini alt ov mong, sum als ikki fáa nøktandi tilboð um eitt sámiligt lív tey týdningarmiklu skúlaárini.

- Vit kunnu øtast og rópa upp um PISA-úrslitini; tey eru ov vánalig, og sjálvsagt skulu tey betrast, men ússalig er tjóð okkara, um vit ikki eisini geva pláss fyri teimum, sum ikki teljast millum teirra, ið uttan trupulleika megna at taka ímóti vanligari umsorgan og undirvísing í siðbundna fólkaskúlanum.

- Tað er ótolandi og óvirðiligt ferð eftir ferð at senda børn og foreldur heimaftur í vónloysið, tí vit, skúlin og almannaverkið, fáa ikki umstøður at viðvirka, sigur hann.

Størsti trupulleikin er, sambært skúlastjóranum, at ábyrgdarbýtið millum myndugleikar ikki er greitt, og tí heldur hann, at skúlaverkið, alt sum tað er, eigur at koma undir somu leiðslu og myndugleika. Niðurstøða hansara í Skúlablaðnum er tí: Gerið nýggja samskipaða lóg fyri alt barnaøkið frá 0 – 18 ár og skipið umsiting og ábyrgd í eina og somu ráðharrastovu.

## Børn við ADHD

Bókstavirnir ADHD standa fyri Attention-Deficit/Hyperactivity Disorder. Tað vil siga trupulleikar við uppmerksomheit, yvirvirkni og impulsivitet. Í Norðurlondum hevur hetta fyrr verið kallað DAMP.

Børn við ADHD eru sera ymisk, men yvirskipað eru trý ymisk sløg býtt eftir hvørjir trupulleikar eru ráðandi.

- ADHD serliga við uppmerksomh eitstrupuleikum
- ADHD serliga við yvirvirkni og impulsitiviteti
- ADHD har allir tríggir trupulleikar eru uppií

Kanningar vísa, at trý til fimm prosent av øllum børnum uppfylla treytirnar fyri ADHD. Tað vil siga, at eitt barn við ADHD er í hvørjum flokki. Hetta merkir aftur, at heilt nógv børn, foreldur og lærarar eru í samband við børn við ADHD.

Trupulleikarnir hjá hesum børnum gera, at tey ofta kenna seg so øðrvísi og býtt, og at tey altíð verða kritiserað – uttan veruliga at vita, hvat tey hava gjørt galið. Tey halda seg vera strævin og trupul, at tey hava skuldina, tá ið okkurt hendir. Tey skilja ikki sosiala spælið og hava ikki álit á sær sjálvum. Ofta missa tey hugin at liva.

Øll hesi eyðkenni kenna Selma og Evy aftur frá sínum børnum. Tey orka ikki tað sosiala, men syrgja um sítt egna einsemi. Og tey skilja ikki, hví júst tey skulu hava tað so trupult, geva sær sjálvum skuldina og missa hugin at liva.